GJALDSTOVAN

# Útbjóðingarskriv

Viðvíkjandi veiting av bygningstryggingum

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO

GJALDSTOVAN

## Útbjóðandi stovnur

Gjaldstovan
Kvíggjartún 1
160 Argir
Telefonnummar: 352400
Kontaktpersónur: Hallur av Rana
www.gjaldstovan.fo

## 1. Inngangur til útboðsmannagongd

Gjaldstovan (eftir hetta "Útbjóðari") vil við hesari áheitan geva tykkum møguleikan fyri at bjóða upp á landsins bygningstryggingar.

Útboðið verður framt sum eitt alment útboð sambært rundskrivi nr. 9000 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum. Tær formligu reglurnar í hesum útboði viðvíkjandi innlating av tilboði, samskifti í millum útbjóðara og tilboðsgevara og aðrar upplýsingar eru at finna í hesum útbjóðingarskrivi.

Kommenterede [RMJ1]: Set inn leinkju.

Hetta útboðið inniheldur fylgjandi stig:

1. Útinnan av tilboði: Tilboðsgevari fyrireikar sítt tilboð við støði í útboðstilfarinum, og tilboð skal vera latið inn innan ásettu tilboðsfreist, sbrt. pkt. 5.1. Í hesum tíðarskeiði kann tilboðsgevari fáa fleiri upplýsingar við at seta skriftligar spurningar, sbrt. pkt. 4.1.
2. Meting av tilboðum: Útbjóðari letur upp og metir um, innkomin tilboð eru í tráð við form- og minstukrøv. Eftir hetta verða innkomin tilboð mett í tráð við ásettu tillutanartreytir, sbrt. pkt. 7.
3. Tillutan av sáttmála: Útbjóðari tekur avgerð um tillutan av sáttmála og kunnar tilboðsgevarum um avgerðina.

## 2. Útboðstilfar

Útboðstilfarið er sett saman av:

- Hesum útbjóðingarskrivinum
- Yvirlit yvir landsins bygningar
- Trú og heiður

Útboðstilfarið kann heintast á www.keypsportal.fo.

## 3. Praktiskar upplýsingar

### a. Spurningar

Tilboðsgevari hevur møguleikan fyri at fáa fleiri upplýsingar um útboðstilfarið við at seta skriftligar spurningar. Spurningar skulu vera á føroyskum og sendast til Hall av Rana á fylgjandi teldupost:

keypsportal@gjaldstovan.fo

Spurningar, ið eru settir áðrenn 09.10.2026 kl. 12.00, verða svaraðir í seinasta lagi seks dagar áðrenn ásettu tilboðsfreist. Spurningar, ið eru settir aftaná freistina fyri at seta spurningar, verða eisini svaraðir í seinasta lagi seks dagar innan ásettu tilboðsfreist, uttan so er, at spurningurin er órímiliga tungførur at svara uppá. Spurningar, ið eru settir seinni enn seks dagar áðrenn freistina fyri at lata inn tilboð, verða allarhelst ikki svaraðir. Spurningar verða svaraðir skrivliga og dulnevnt. Øll svar kunnu síggjast á www.keypsportal.fo í seinasta lagi 12.10.2026.

### b. Vavi á útboð

Útboðið viðvíkur øllum tryggingum á bygningar hjá landinum. Gjørd verður ein tryggingarsáttmáli, har Gjaldstovan er tryggingartakarin, vegna landsins stovnar. Gjaldstovan rindar tí eisini tryggingargjaldið, og fer at víðarifakturera innanhýsis til landsins stovnar.

Rundskriv nr. 9000 um tryggingarviðurskifti landsins frá 21. nov 2003, ásetur neyvu treytirnar fyri tá landi tryggjar sínar bygningar.

Yvirlit yvir bygningar, sum er hjálagt, vísir teir bygningar, sum landi eigur. Hetta er ikki okkara endaligi listi yvir hvørjar bygningar vit skulu tryggja. Møguliga manglar onkur og møguliga er onkur á listanum, sum vit ikki skulu tryggja. Hetta er fyrstu ferð vit samla allar tryggingar, og tí hava vit ásett, at tað skulu verða seks vikur millum vit velja ein vinnara av hesum útboð, til tryggingarnar koma í gildið. Í hesum tíðarskeið hugsa vit, at veitarin hjálpir okkum at koma til semju um hvørjar bygningar vit tryggja og hvørjar vit ikki tryggja.

Útbjóðari tekur tí fyrivarni fyri at ein ávís til- og frágongd kann hava verið, sum vit ikki hava kunnleika um. Eisini kunnu verða bygningar á yvirlitinum, sum hava so lítið virði, at stovnurin ikki ynskir at tryggja bygningin. Vit miðja í móti, at næstu ferð vit bjóða bygningstryggingarnar út, so hava vit betur data.

Vit meta tó, at listin yvir bygningar er nøktandi fyri, at tryggingarveitarar kunnu bjóða uppá bygningstryggingar, tí at allir veitarar sostatt hava eins upplýsingar – og harvið er lætt hjá okkum at samanbera innkomin tilboð.

# 4. Tilboð

## a. Tilboðsfreist og adressa til innlating av tilboði

Tilboð skal latast inn talgilt til Gjaldstovan á fylgjandi teldupostadressu: keypsportal@gjaldstovan.fo

Tilboð kann ikki latast inn á annan hátt. Freistin at lata inn tilboð er: 16.10.2026 klokkan 12.00

Tilboð, ið verða latin inn aftaná hesa freist, verða ikki viðgjørd.

## b. Frágreiðing um tilboð og prís

Eitt tilboð skal fylgja ásetingum í rundskriv nr. 9000 um tryggingarviðurskifti landsins.

Tilboðsgevarin skal upplýsa tryggingarkostnaðin fyri hvat viðheftu landsins bygningar kosta at tryggja. Um tryggingarveitarin metir, at onkur bygningur ikki kann tryggjast, skal tað upplýsast. Prísvøksur er ikki í sáttmálatíðarskeiðinum, undantikið eru force major líkandi støður.

Tilboð skal latast inn á føroyskum.

## c. Sáttmálalongd

Rammusáttmálin skal verða galdandi í 3 ár, og settur at byrja 1. jan 2027.

## d. Tryggingarskjøl og rokningar

Gjaldstovan er tryggingartakarin, og rindar tryggingargjaldið.

## e. Skaðar

Hendur ein skaðið á ein bygning, so er tað stovnurin og møguliga Landsverk, sum samskiftir við tryggingarveitaran um at fáa bøtt um skaðan. Gjaldstovan luttekur sum meginregla ikki í skaðaviðgerð.

## f. Høvuðsforfall

Høvuðsforfall á tryggingarskjølum skal verða 1. januar.

## g. Serlig um umvælingar á tryggjaðu bygningarnar

Í samband við umvæling ella uppíbygging skal verandi bygningstryggingin fevna um tann økta brunaváðan fyri bæði arbeiðstøkuna og verandi bygning, har arbeiðstakarar skulu vera viðtryggjaðir. Tryggingarfelagið kann taka gjald fyri henda økta váða.

Tilboðsgevari kann treyta brunafulnaðin fyri arbeiðstøkuna við, at reglur um heitt arbeiði verða hildnar, har heitt arbeiðið verður framt. Tilboðsgevarin skal góðtaka, at teir í arbeiðstøkuni luttakandi arbeiðstakarar eru viðtryggjaðir á bygningstryggingini fyri brunaskaðar á verandi bygning íkomnir í samband við fremjan av arbeiðstøkuni, men tilboðsgevarin kann treyta sær rætt til aftursókn móti skaðaelvandi arbeiðstakara, um brunaorsøkin er vantandi hald av reglum um heitt arbeiðið.

Gingið verður út frá, at allar arbeiðstøkur verða framdar sambært galdandi reglum um heitt arbeiðið, og tilboðsgevarin kann ikki treyta fulna av øðrum trygdartiltøkum.

Serliga skal viðmerkjast, at spreingiskaðar í hesum sambandi ikki eru brunaskaðar, uttan so, at spreingingin elvir til opnan logandi eld.

Tað áleggur stovnsleiðara at fráboðað um arbeiðið verður framt á bygningin, sum kann hava ein øktan váða. Um tað er Landsverk, sum stendur fyri arbeiðinum, so er tað teir, sum fráboðað til tryggingarfelagið.

### h. Uppsøgn av tryggingum

Velur man at lata inn tilboð, so góðtekur man, at øll tryggingarskjøl fevnd av rammusáttmálanum eru uppsøgd til næsta høvðusforfall. Vinnari av tilboðnum, skal ikki hava aðra heimild fyri at yvirtaka tryggingarskjølini.

### i. Tilval trygging

*Trygging, allir bygingar*
Landið ynskir, at allir bygningarnir eru tryggjaðir. Fyri at tryggja, at landið ongantíð kemur í eina støðu, at ein bygningur ikki er tryggjaður, vegna tað at hann ikki er upplýstur á yvirlitinum, ynskja vit at puljan av bygningum eisini fevnir um ein møguligan gloymdan bygning.

Tryggingargjaldið fyri gloymda bygningin verður ásett sum ein miðalrata av samlaða tryggingargjaldinum. Talan kann í mesta lagi vera um bygningar á í alt 2000 fermetrar, ið eru gloymdir.

*Loss limit*
Vinnandi tryggingarfelag og Gjaldstovan kunnu samráðast um "loss limit" ásetingar

*Leysafæ*
Vinnandi tryggingarfelag og Gjaldstovan kunnu samráðast at tryggja leysafæ, til bygningar sum hava serliga dýrt innbúgv.

Gjaldstovan ynskir at prísurin fyri hesa trygging, verður upplýstur, og kann veljast til/frá.

### j. Nýggir bygningar

Tað er krav, at tá landsins stovnar ynskja at tryggja nýggjar bygningar, sum ikki eru á yvirlitinum í hesum útboði, so er tað til sama prísstruktur / avsláttur, sum aðrir bygningar, sum eru tryggjaðir.

Tað er uppgávan hjá Gjaldstovuni, at tilmelda og frámelda bygningar frá puljutryggingini. Gjaldstovan kann lata hesa uppgávu víðari til annan stovn hjá landinum.

*Tilval*
Tryggingarfelagið og Gjaldstovan kunnu samráðast um at áseta serligar "loss limit" ásetingar, fyri teir størri bygningarnar.

*Leysafæ*
Tryggingarfelagið og Gjaldstovan kunnu samráðast um leysafæ trygging, til bygningar við serliga dýrum leysafæ.

### k. Lata upplýsingar

Tryggingarfelagið sum vinnur útboð, bindur seg til at lata Keyp landins upplýsingar um tryggingarviðurskiftini hjá stovnum landsins, tá Keyp landsins umbiður hesar.

### l. Samráðingar og sáttmáli

Útbjóðari hevur ikki møguleika fyri at samráðast við tilboðsgevarar um innkomin tilboð. Útbjóðari kann tó venda sær til tilboðsgevarar við tí endamáli at neyvlýsa innihaldið í tilboðnum, og tá ið hetta ikki elvir til mismun í millum tilboðsgevarar.

Tað vera sostatt ongar sáttmála- ella prís samráðingar í samband við hetta útboðið, og tískil verður heitt á tilboðsgevara um at fyrireika tilboðið soleiðis, at sáttmálin kann undirskrivast á tilboðsskjalinum.

### m. Hagtøl

Gjaldstovan hevur tørv á at fáa upplýst í árliga hvussu stór sparing er, í mun til vanligan lista prís. Hesin upplýsing er ikki neyðugt at verða í sjálvum tilboð, men kann koma aftaná, og vit kunnu avtala nærri hvussu hetta fer fram.

Gjaldstovan skal víðari fakturera tryggingargjaldið til landsins stovnar, og vit síggja fyri okkum at tað tryggingarfelag sum vinnur útboðið, hjálpir okkum, á ein einfaldan hátt, at uppgerða hvat skal víðari fakturerast. Eitt nú um ávísir bygningar eru dýrari og ávísir eru bíligari í tryggingargjald.

### n. Fyrivarni og minstukrøv

Øll krøv í útboðstilfarinum eru minstukrøv. Eitt minstakrav verður skilt sum eitt krav, ið treytaleyst skal lúkast.

Tilboð, ið ikki lúka øll minstukrøv verða burturvíst, men tað verður tó sipað til, at útbjóðari kann venda sær til tilboðsgevarar við tí endamáli at neyvlýsa innihaldið í tilboðnum, og tá ið hetta ikki elvir til mismun í millum tilboðsgevarar.

Tilboðsgevari verður eggjaðir til at seta skriftligar spurningar, um ivamál eru í samband við útfylling av fylgiskjølunum.

### o. Freist, ið tilboð skal standa við

Tilboð skal standa við 60 arbeiðsdagar roknað frá ásettu tilboðsfreist.

## 5. Viðgerð av innkomnum tilboðum

Útbjóðari letur upp innkomin tilboð aftaná ásettu tilboðsfreist. Útbjóðari kannar eftir um innkomnu tilboðini lúka form- og minstukrøv. Útbjóðari kann, aftaná tilboðsfreistina, venda sær til tilboðsgevarar fyri at neyvlýsa innihaldið í tilboðunum. At enda verða innkomin tilboð mett í tráð við ásettu tillutanartreyt, sbrt. pkt. 7.1.

Tá ið útbjóðari hevur tikið avgerð um tillutan av sáttmálanum, verða allir tilboðsgevarar kunnaðir samstundis. Kunningin inniheldur eina frágreiðing av avgerðini, harundir fyrimunir og vansar við vinnandi tilboðnum.

## 6. Meting av tilboðum

Sáttmálin verður tillutaður í tráð við ásettu tillutanartreyt. Metingin av innkomnu tilboðum tekur støði í fylgjandi undirtillutanartreytum:

1. Prísur 100 %

## 7. Tillutan av sáttmála og endi á útboði

GJALDSTOVAN

Sáttmálin verður tillutaður, tá ið útbjóðari hevur valt tilboðið.

Útbjóðari er ikki bundin til at taka av tilboðnum, sum hevur besta prís, og treytar sær  rættin til at strika útboðið.

Sjálvt um sáttmálin verður tillutaður, eru tilboðsgevarar bundnir av sínum tilboði til útbjóðari hevur undirskrivað sáttmálan, ella ásetta tíðarskeiðið í pkt. 5.6 er av.

Útreiðslur, sum tilboðsgevarar hava í samband við hetta útboð, eru óviðkomandi fyri útbjóðara. Hetta er eisini galdandi, um útbjóðari verður noyddur at strika útboði.

| **Virksemi** | **Dato, klokkutíð** |
|---|---|
| Freist at senda inn spurningar, sbrt. pkt. 4.1. | 09.10.2026 |
| **Tilboðsfreist, sbrt. pkt. 5.1.** | 16.10.2026 kl. 12.00 |
| Væntandi tillutan av sáttmála | [ultimo november] |

Vit gleða okkum at fáa tykkara tilboð.

Vinaliga

Hallur av Rana
fulltrúi